## VEÐRIÐ


Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi, seinnapartin minni vindur. Sólglottar, men eisini ælingur og hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot av landnyrðingi ella av ymsum ættum og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og norði og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar, men sunnudagin veksur hann vindin upp í hvassan vind og ælingur. Hitin millum 10 og 14 stig.

*Juni var bæði turrur í lýggjur. Avfallið var bert 17mm ímóti 66mm, sum er miðal yvir 30 ár. Miðalhitin var 9,9°c ímóti 9.0°c yvir 30 ár.*



# Atlantic flýgur til Dublin

**Atlantsflog skipar í august fyri ferð til írska høvuðsstaðin. Flogið verður beinleiðis millum Føroyar og Dublin**

Atlantsflog hevur nú sett Dublin á sína ferðaskrá. Talan er um eina serliga pakkaferð, sum føroyska flogfelagið ger til írska høvuðsstaðin, haðani føroyingar millum annað hava fingið Guinness, U2 og Brian Kerr.

Ferðin til Dublin verður í døgunum frá 11. til 15 august, og umframt flogferð er eisini gistingarhús og bussflutningur við í pakkanum.

Farið verður úr Føroyum týsdagin 11. august og flogið verður beinleiðis til Dublin.

Í Dublin verður gist á Jury's Inn Christchurch, sum liggur í elsta býarpartinum stutt frá Temple Bar og Trinity College.

Í Dublin verður gjørligt at vitja kend støð, shoppa og kanska vitja tær mongu kendu pubbirnar, sum eru har.

Leygardagin 15. august verður so flogið beinleiðis úr Írlandi og heimaftur til Føroya.

Meira fæst at vita um ferðina á heimasíðuni hjá Atlantsflogi.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 15 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 20 |
| Oslo | - |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 25 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 26 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 30 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 39 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 13 |
| New York | 27 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | -- |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1002 hPa. yvir Skotlandi fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum komandi samdøgur.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið norðan fyri Skotland grynnist og brúgvalagið yvir Føroyum stendur mestsum í stað.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 06/07 kl. 06[00] – 07/07 06[00]. Hitin í gjár: 10,6°
Minsti hiti máldur í juli: +0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 06/07 kl. 06[00] – 07/07 06[00].
Avfallið higartil í juli: 2 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

7. juli Fullmáni/ Mánin longst frá jørini
15. juli Seinna kvarter
21. juli Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. juli | - | 12:05 | 11:05 | 23:38 | 11:20 | 23:53 | 01:46 | 14:05 | 02:49 | 15:05 | 10:22 | 22:54 | 09:22 | 21:54 | 00:01 | 12:20 | 01:01 | 13:20 | 11:50 | - | 00:46 | 13:05 |
| 15. juli | 00:38 | 13:12 | - | 12:12 | - | 12:27 | 02:38 | 15:12 | 03:38 | 16:12 | 11:26 | - | 10:26 | 23:02 | 00:53 | 13:27 | 01:53 | 14:27 | 00:23 | 12:57 | 01:38 | 14:12 |
| 16. juli | 01:47 | 14:22 | 00:47 | 13:22 | 01:02 | 13:37 | 03:47 | 16:22 | 04:47 | 17:22 | 00:02 | 12:37 | 11:37 | - | 02:02 | 14:37 | 03:02 | 15:37 | 01:32 | 14:07 | 02:47 | 15:22 |
| 17. juli | 02:46 | 15:11 | 01:46 | 14:11 | 02:01 | 14:26 | 04:46 | 17:11 | 05:46 | 18:11 | 01:01 | 13:26 | 00:01 | 12:26 | 03:01 | 15:26 | 04:01 | 16:26 | 02:31 | 14:56 | 03:46 | 16:11 |
| 18. juli | 03:38 | 16:05 | 02:38 | 15:05 | 02:53 | 15:20 | 05:38 | 18:05 | 06:38 | 19:05 | 01:53 | 14:20 | 00:53 | 13:20 | 03:53 | 16:20 | 04:53 | 17:20 | 03:23 | 15:50 | 04:38 | 17:05 |


Forelskað?
Vís tað í Sosialinum

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo